tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Høgni Mohr, Niclas Johannesen
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Kvettlíknandi framferð?

Oddagrein

ÓLI Jacobsen og Birgir Danielsen hava havt greinar í bløðunum um loysingarætlaninar hjá samgonguni. Báðir hava skýrt ætlanina at vera »kvettlíknandi«. Atli Dam var meira bersøgin í 5-aranum her í heyst, har hann segði við Høgna Hoydal, at teir ætlaðu at lumpa føroyingar til loysing. Politiskt kvett ella kvettroyndir er ikki nakað vit kenna til á okkara leiðum. Okkara parlamentariska skipan og siðvenjur átti at verið so mikið sterk at slík málnýtsla ikki átti at komið fyri uttan frá politiskum vargum.

TÁið nú tríggir fyrrverandi lóggevarar - hvør úr sínum heraðshorni - gera vart við spurningin, er tó neyðugt at varnast eitt sindur. Taka vit nú føroysku lógarskipanina, so er løgtingið lóggevandi. Landsstýrið er umsitingarvald hjá løgtinginum, ger kunngerðir og umsitur landsins lógir í tráð við tingsins vilja. Hugtakið »tingsins vilji« hoyrist ofta, tá ið ivi er um lógartekstir. Vit minnast skipamálini og lógargrundarlagið har. Tá var umrøddi vilji ofta frammi.

LØGTINGSVAL er í minsta lagi 4. hvørt ár. Tá leggja flokkar og valevni tey mál fram, ið teir/tey vilja virka fyri tað næsta valskeiðið. Tey, sum koma á ting fara so til verka við lógararbeiðið og lóggeva um alt møguligt. Her tykjast ikki vera avmarkingar. Men her eru avmarkingar í, hvat eitt løgting kann gera í einum valskeiði!

LÆRDIR av royndum so hava okkara forgangarar í lóggávuarbeiði avmarkað tær heimildir, ið **eitt** løgting hevur. Hettar er gjørt í stýrisskipanarlógini. Hon er samtykt av 2 løgtingum við vali ímillum og má sostatt vera úrslit av viljanum hjá 2 tingum. Sambært hesi lóg kann einki einsamalt ting fremja atgerðir hvørki so ella so, ið ger, at okkara stýrisskipan broytist. Fullveldisætlanirnar hjá Tjóðveldisflokkinum hava við sær, at hendan lóg verður burtur í meldrinum.

HON kann ikki blíva burtur ella avtakast, tí ein avtøka av lógini er tann mest umfatandi broytingin ið er og ein broyting skal samtykkjast av tveimum løgtingum. Tað sigur lógin. Alt annað er lógarbrot. Um ein roynir at »by-passa« lógina við nøkrum ekspert úttalilsum, so leypir ein bukk um demokratiið og tveir løgtingsviljar. Og tá er orðafellið »kvettlíknandi framferð« knappliga ógvuliga nærverandi og virðingin fyri demokratiskum spælireglum lítil.

Sosialurin

Viðmerking:

Aftursvar til Hera Mohr og Meinhard Andreasen

Hetta er so annað lesarabrævið hjá tær til mín. Hví tey verða skrivað skilji eg ikki, tá tey ikki viðgera tað, eg havi skrivað. Eg tími heldur ikki at fara at illgita um tað. Eisini gleðir tað meg, at tílík skriving er við at fara í søguna.

Tað er stuttligt og lærurikt, at kvøldið fyri, áðrenn eg fekk Sosialin, har títt seinasta lesarabrævið stóð, ringdi ein vinmaður búsitandi í Danmark til mín og læs brævið hjá tær fyri mær av internetinum. Hann helt málið verða mikið skemtingarsamt og læs upp úr bókini »Bevingede ord«, har eisini hatta við omelettini stóð. Hann lovaði at senda mær eina tílíka bók, so vit vóru nøkunlunda á sama støði.

Ná, skemt til viks. Eg loyvdi mær at siga, at tað var Franco, hann var jú hin stóri generallissimus, havi eisini sað tað upp á prent, tók tað eisini eins og vit siga Churchill vann kríggið. Havi enntá sað, at onkur hevur hildið, at tað vóru tíðindafólkini, sum sjálvi komu við tí. Hetta passaði so frálíka væl sum felagsnevnari fyri alla støðuna í Spaniu og fór um allan heimin. Tú sigur, at tað var Queipo de Liano y Serra generalur, sum fyrst brúkti orðingina fimta kolonna.

Men nú skalt tú bara hoyra: Enn ein vinmaður mín ringir og spyr um eg havi lisið bókina hjá Hugh Thomas: The Spanish Civil War. Pelican Books. 1974.

Hesin góði Thomas skal vera av mætastu søgumonnum í Spanska Borgarkrígnum, og hvat sigur so hann. Ja, hann gevur tær ikki rætt, tí hann sigur á s. 402, at tað var Emilio Mola Vidal, generalur, ið fyrst segði tey kendu orðini. Nú kundi eg eisini enda við einum kendum latínskum setningi, onkrir vilja sleppa framat, men tað sleppa teir ikki. Hetta er longu meir enn ríkiligt.

Góði Meinhard Andreasen, ættaður úr Fámjun!

Bara nøkur fá orð til títt bræv vil mín í Dimmalætting. Nei, kuldi hevur ongantíð plágað meg, og tá ið eg var ungur dámdi mær væl kropsligt arbeiði. Ikki eru tað meir enn gott hálvt ár síðan, vit báðir tosaðu um, hvussu gott tað var at vera í Íslandi. (Vit vóru ikki við sama skipi). Við trolarunum gingu vit seks og seks, og har var eingin pøs at vaska sær í, men eg havi eisini roynt tað við einum førsoykum skipi. Ja, tú lærdi til skipara, eg til lærara. Eg kendi tá, at tað var ein stór avgerð at taka, men at hon var røtt. Hevði hugsað um, at læra til skipara eins og tú. Minnist ikki nú um tú sigldi sum skipari, men eina tíð koyrdi tú hýruvogn. Hatta er lívið. Eisini segði eg tær tá, at eg vann so mikið á sjónum, at eg átti fyri alla læruna. Tá vóru heldur ikki tær stóru stuðulsskipanirnar. Aja, eg meini tað, men hetta verður ov fjákut. Um nakar av teimum yngru lesur hetta, veit eg ikki, men soleiðis var ofta skrivað og tosa, tá ið eg var ungur, hetta er við at fara í søguna. So eg takki tykkum báðum fyri, at tit minna okkum á eitt siðsøguligt fyribrigdi, sum nú er um sýn. Fullveldið kann ikki reinska okkum fyri allar syndir, men tílíkt prát verður tað tíbetur ikki stundir til. Enn ein grund fyri at velja fullveldið.

30.9.99
Steinbjørn B. Jacobsen

Hvítabók – eitt vælsignilsi fyri sambandið

Fullveldið — uttan selar og reim.

Ríkisfelagsskapurin — við selum og reim — sjálvandi!

Nú kom hon, tann nógv umtalaða og leingi væntaða, ið skal geva svar uppá allar spurningar.

Eg má nevna, at ein gerst meira ríkisfelagsskaps hugaður við at lesa bøkurnar. Tað er galdandi niðanfyrinevnda. Og vónandi onnur eisini.

Somuleiðis verður við 7 tumma seymi sligið fast, at teir flokkar, ið hava skýrt Sambandsflokkin fyri at koma við ræðumyndum, nú mugu ásanna — um teir eru nakað verdir - at tær bert eru sannar og helst undirmettar. Tí Hvítabók vísir heilt nágreiniliga, at hvørt einasta orð, vit hava fört fram um fullveldi hevur verið rætt - tó um ásannast skal, at vit helst hava verið ov bjartskygdir í okkara metingum um processina, ið samgongan enn hevur ætlanir at fremja.

Dømir úr hvítubók: Um ríkisveitingin minkar, kann væntast: minni almennur sektorur, minni privat tænastuvinna, vaksandi arbeiðsloysi, fráflyting; lægri løn.

Hækkandi skattir.

Virðislækking av føstum ognum.

Samstundis sum húsaskuld o.a. lutfalsliga økjist, um lønin minkar. T.v.s. fleiri missa hús og heim.

Eisini er komið fram, at livistøðin lækkar 24 % - um fullveldið verður valt!

Hvussu nógvar føroyingar ber tilfeingi í Føroyum:

Tað hevði verið ynskiligt, at Hvítabók viðgjørdi eina meting hjá framstandandi búskaparfrøðingum um, at Føroyar bert hava tilfeingi til 20000 føroyingar. Um fullveldið vil gera at 25000 føroyingar rýna av landinum. Tá hetta tal er nevnt fyri stuttari tíð síðani, hevði verið rímiligt at metingar vóru gjørdar um, hvussu stóra fráflyting vit kunnu vænta fer fram — um fullveldisætlanin verður framd, sum upprunaliga ætlað.

Fullveldið verst:

Tjóðveldið hevur nú í 50 ár tosa um at kvetta. Ein frymil í Hvítubók sýnir, at um ríkisveitingin verður burtur eftir einum árið — fara Føroyar fallit við brestin! At tjóðveldisfólk nú ikki orka at hoyra orðið kvetting, ið hevur verið teirra hornasteinur í 50 ár, er væl skiljandi.

Ríkisfelagsskapurin — nógv best:

Um harafturímóti ríkisveitingin verður varðveitt, samstundis sum væl verður stýrt fíggjarliga, so gevur tað Føroyum nógv bestar fíggjarligar karmar at mennast undir.

Tað vísir Hvítabók.

Ríkisfelagsskapurin er so nógv tann besta loysnin fyri føroyingin — bæði nú og í framtíðini .

Tað vísir Hvítabók greitt. Og Føroyar fáa eisini eitt reint 11-tal fíggjarliga í løtuni. Afturímóti hesum munar eitt førkøla fullveldi lítið.

Tað er bara veruleikin!

Men tað er jú tað, ið vit altíð hava sagt_vit í Sambandsflokkinum!

Við Ríkisfelagsskapskvøðu
Marjus Dam,
løgtingsmaður

Tríggir fuglar yvir Tvørábygd

Tríggir fuglar flúgva yvir heimbygd teirra
og teir síggja syrgjandi, ung og gomul
tey gráta, og ynskja teirra dreingir aftur
men tey vita ikki, at teir enn liva

Teir liva, tí at teir eru í minnum og hjørtum
hjá teim, ið elskaðu teir
Hann kallaði teir heim, og teir máttu fara
men í minnunum eru teir her altíð

Teir tríggir fuglarnir syngja
men eingin hoyrir song teirra
og teir síggja eina bygd, tyngda av sorg
og friðarliga av sakni

Spakuliga byrjar aftur ein dagur
og teir tríggir fuglarnir fyrireika seg
teir fyrireika seg til eina langa ferð
til eitt undurfult stað.

Fuglarnir breiða teirra veingir út
og fara á flog, upp í móti einum bláum himli
teir líta niður á heimbygd teirra
og gleða seg til ta stund
tá teir opna eitt portur av perlum
og lova øllum teirra kæru inn.

Henda yrking er ognað avvarðandi hjá teimum trimum, ið doyðu í ferðsluvanlukkuni.

Durith í Homrum